UTTAN ÚR HEIMI

# Einki minni enn eitt undur

**Øll tey 309 fólkini sluppu við lívinum, tá eldur kom í eitt flogfar, sum fór út av lendingarbreytini**

FLOGÓHAPP

*Árni Joensen:*
*fartekst@mail.dk*

Tað var einki minni enn eitt undur, at eingin lat lív, tá eldur kom í tað franska Airbus A340-flogfarið, júst sum tað var í ferð við at seta seg á Pearson International Airport í kanadiska býnum Toronto fyrrakvøldið.

297 ferðafólk vóru við flogfarinum, og manningin taldi 12. Aftaná máttu 22 fólk undir læknahond, men tey flestu høvdu bara fingið smávegis snuddir.

Í gjár var ikki greitt, hví flogfarið fór út av lendingarbreytini, og hví eldur kom í tað. Tað var illveður á Toronto-leiðini fyrrakvøldið og torusláttur, og summi av ferðafólkunum vildu vera við, at eitt snarljós rakti flogfarið, júst sum tað skuldi seta seg. Tey greiddu eisini frá, at ljósið inni í flogfarinum fór.

Onnur eygnavitni vildu vera við, at motorarnir í flogfarinum slóknaðu, tá flogfarið hevði fingið hjólini niður á lendingarbreytina.

Av tí at veðrið var so vánaligt, var øll tilbúgvingin á flogvøllinum til reiðar, og tað tók bara 20 sekund hjá teimum fyrstu bjargingarmonnunum at koma til flogfarið.



*Franska flogfarið fór einar 200 metrar út av lendingarbreytini og steðgaði tætt við ein motorveg*

*Mynd: Reuters*

Internet Sosialurin
www.sosialurin.fo

**FORD TRANSIT 2.0 DIESEL**

Km 44.630
Árg. 18.12.2002
Nývirði 225.000,-
Dagsvirði 163.000,-
Síðsta boð 85.000

Bjartur Brekkstein, sýnsmaður



Set teg í samband við sýnsmannin á tlf. 345771

Akfarið hevur ongan størri skaða, tað kann síggjast í garðinum hjá TF á Hálsi

**HYUNDAI SONATA 2,0 BENSIN**

Km 81.000
Árg. 04.12.2001
Dagsvirði 140.000,-
Gev eitt boð

Fróði Müller, sýnsmaður



Set teg í samband við sýnsmannin á tlf. 345727 - 214166

Akfarið hevur ongan skaða, tað kann síggjast í garðinum hjá TF á Hálsi

TRYGGINGARFELAGIÐ FØROYAR
- so ert tú tryggari

# Teir víðgongdu jødarnir kunnu seta eld á Miðeystur

**Teir høgrasinnaðu jødarnir, sum royna at forða afturtøkuni úr Gaza-geiranum, eru ein vandi fyri alt Miðeystur, sigur ein fyrrverandi ovasti í ísraelsku fregnartænastuni**

MIÐEYSTUR

*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Carmi Gillon hevur verið leiðari í ísraelsku fregnartænastuni, og hann stúrir fyri, hvat kann henda, nú tey jødisku niðursetufólkini skulu flytast úr Gaza-geiranum. Carmi Gillon sigur, at tað eru ikki tey nógvu túsund mótmælisfólkini, sum eru tann stóri vandsn, men heldur tey fáu, men sera víðgongdu á tí átrúnaðarliga høgravonginum, sum eru ein hóttan - ikki bara fyri Ísrael, men alt Miðeystur.

- Vit vita, hvørji tey eru. Vit hava nøvn teirra, og eg haldi, at vit áttu at sett tey í varðhald, júst sum vit gera við yvirgangsmenn ella fólk, sum kunnu finna upp á at fremja yvirgang. Í mínum eygum er eingin munur á teimum og islamskum yvirgangsmonnum, og vit kunnu við góðari samvitsku seta tey í varðhald fyri at verja demopkratiið, sigur Carmi Gillon við Politiken.

Teir víðgongdu jødarnir stava frá felagsskapinum Jewish Defence League, hvørs leiðari, rabbinarin Meir Kahane, flutti úr USA til Ísraels. Har eydnaðist tað honum at verða valdur í Knesset, men seinni tók tingið órinið frá honum og bannaði flokki hansara. Hann er eisini døðmur fyri rasismu.

Carmi Gillon vísir á, at í apríl í 1982 tóku umleið 40 víðgongdir jødar eitt hotell í einari jødiskari niðursetubygd í Sinai, sum tá var undir ísraelskum eftirliti. Teir hóttu við at fremja sjálvmorð fyri at mótmæla, at Ísrael hevði játtaðat lata egyptar fáa Sinai aftur.

- Tá máttu vvit í fregnartænastuni gjalda ferðaseðilin hjá leiðara teirra, sum hann kundi koma úr USA at tosa teir til sættis. Ein av teimum, sum hersettu hotellið, var Baruch Goldstein, sum tólv ár seinni myrdi ein hóp av palestinum í Hebron.

Carmi Gillon sigur, at tað eru tær somu kreftirnar, sum gera vart við seg, nú niðursetufólkini skulu flytast úr Gazageiranum, og hann stúrir fyri, hvat kann henda.

- Hjá teimum er tað ikki nóg mikið at ganga mótmælisgongu. Vit vita, at teir hava fyrr havt ætlanir um at spreingja al-Aqsa moskuna í Jerusalem í luftina. Gera teir tað, er vandi fyri einari veruligari kreppu í Miðeystri, sigur fyrrverandi ovastin í ísraelsku fregnartænastuni, sum fyri nøkrum árum síðani var ísraelskur sendiharri í Danmark.

# Arbeiðsleysir flogskiparar

Sparingar í flogferðsluni hava gjørt, at nógvir danskir flogskiparar hava ilt við at finna nakað arbeiði í Danmark ella í Evropa, og teir hava tí einki annað í at velja enn at leita sær arbeiði aðrastaðni í heiminum, skrivar Politiken.

Sambært blaðnum hava fleiri fingið arbeiði hjá flogfeløgum í India. Síðani indisku myndugleikarnir loyvdu fríari kapping á flogmarknaðinum, eru fleiri nýggj flogfeløg stovnað, og tey vilja fegin hava evropeiskar flogskiparar. Í dag starvast umleið 2.500 flogskiparar hjá teimum indisku feløgunum, men framvegis er tørvur á umleið 450 afturat, og tað kemur teimum arbeiðsleysu donsku flogskiparunum væl við.

Indiska flogferðslan er ikki merkt av sparingum, heldur tvørturímóti. Sum er hava flogfeløgini har bílagt heili 450 nýggj flogfør frá verksmiðjunum Airbus og Boeing, og tí verður uppaftur størri tørvur á flogskiparum í komandi árum, skrivar Politiken.